Fylgiskjal 3

LM-088/2020

Annika Petersen

Fra: Jákup Nielsen
Sendt: 11. januar 2021 14:46
Til: Kristvør H. Poulsen
Cc: FSS - Føroya Stiftsstjórn; Bergur Berg
Emne: SV: Uppskot til broyting í løgtingslóg um fólkanøvn til hoyringar - freist 16. januar 2021

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkanøvn

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur í telduposti 4. januar 2021 sent Uttanríkis- og mentamálaráðnum omanfyri nevnda løgtingslógaruppskot til hoyringar.
Boðað verður við hesum frá, at Uttanríkis- og mentamálaráðið ongar viðmerkingar hevur til løgtingslógaruppskotið.

Vinarliga/Sincerely
Jákup Nielsen
fulltrúi, cand.jur/legal adviser

Uttanríkis- og mentamálaráðið/Ministry of Foreign affairs and culture
Hoyviksvegur 72 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 306500 • Mobile +298 555026
jakupn@ummr.fo www.ummr.fo

Fra: Kristvør H. Poulsen <Kristvorp@uvmr.fo>
Sendt: 4. januar 2021 14:36
Til: Mentamálaráðið <ummr@ummr.fo>; 'anfinnurj@setur.fo' <anfinnurj@setur.fo>; malrad@malrad.fo; FSS - Føroya Stiftsstjórn <stift@kirkjan.fo>; Jógvan Fríðriksson <jf@kirkjan.fo>; Theodor Eli Dam Olsen <theol@kirkjan.fo>
Emne: Uppskot til broyting í løgtingslóg um fólkanøvn til hoyringar - freist 16. januar 2021

Góðan dagin

Uppskot til broyting í løgtingslóg um fólkanøvn til hoyringar

Umsitingin av navnamálum var í 2014 løgd til Umhvørvisstovuna at sita fyri. Tá ið heimildir soleiðis verða lagdar til ein undirskipaðan stovn, kunnu avgerðir hjá undirskipaða stovninum kærast til landsstýrismannin, hvørs avgerð er endalig innan fyrisitingina. Hetta hevur eitt nú havt við sær, at avgerðir, sum navnanevndin tekur eftir navnalógini, kunnu kærast til Umhvørvisstovuna. Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni í hesum somu málum eru ikki endaligar innan fyrisitingina og kunnu kærast víðari til landsstýrismannin.

Fyri at kunna skerja kærurættin fyrisitingarliga krevst beinleiðis heimild í løgtingslógini. Ætlanin er at broyta navnalógina, soleiðis at um landsstýrismaðurin heimilar stovni undir sær at sita fyri heimildum navnalógarinnar, so

gerast avgerðir stovnsins endaligar innan fyrisitingina. Í navnalógini í dag er eingin kærufreist. Ætlanin er at seta inn eina kærufreist à 4 vikur.

Landsstýrið hevur eisini fingið áheitanir um at broyta navnalógina, soleiðis at tað gerst møguligt hjá hjúnafeløgum at fáa somu samanseting av millum- og eftirnøvnum. Í dag kann annar hjúnafelagin, við samtykki, fáa ættarnavnið hjá hinum, men tað ber ikki til at hava somu samanseting av millum- og eftirnøvnum.

Viðvíkjandi rættinum hjá giftum persónum at fáa somu samanseting av eftirnøvnum kann ein loysn vera, at loyva hjúnafeløgum, við samtykki frá makanum, at taka millum- ella ættarnavnið hjá makanum sum sítt millumnavn.

Viðmerkingar til uppskotið skulu verða Umhvørvis- og vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi **16. januar 2021.**

Vinarliga

Kristvør H. Poulsen, skr.
Umhvørvis- og vinnumálaráðið